# Gerhard kundi neyvan gera annað

**Politiski viðmerkjarin, Jógvan Mørkøre, trýr ikki rættiliga uppá, at samgongan megnar at halda á longi sum minnilutasamgonga. Hann eftirmetir her støðuna, nú samgongan hevur mist meirlutan,og hugleiðir um vánaligt samgongustev, tingfólk í sjálvdrátti, flokkar, ið ikki eru ein eind, vantandi flokslýdni, men eisini sær hann síðuna hjá Gerhardi, ið hann metir ikki kundi gera annað, enn tað hann gjørdi, fyri at vera trúgvur mótvegis veljarum sínum**

POLITIKKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Eftir at Gerhard Lognberg tók seg aftur sum partur av samgonguni, er samgongan ein minnilutasamgonga, og tað er nýtt í Føroyum.

Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur og politiskur viðmerkjari, heldur, at hetta er ikki ókent í londunum kring okkum, t.d. í Noreg og Danmark, men tá hann verður spurdur, um hann ærliga trýr uppá hesa minnilutasamgonguna, ella eina minnilutasamgongu í Føroyum, so er svarið greitt nei.

- Men í Danmark er samgongan ein minnilutasamgonga, ið hevur Dansk Folkeparti sum stuðulsflokk. Ein má fáa ein stuðulsflokk, sum ein ein veit iki hoppar yvirum miðjuna. Sitandi samgonga í Føroyum má nýta danska leistin og fáa sær ein stuðulsflokk. Stóru andstøðuflokkarnir koma neyvan upp á tal, men Kári á Rógvu úr Sjálvstýrisflokkinum hevur sagt, at teir vilja hava ávirkan á politikkin, og tað ber brá av, at teir vilja gera avtalur, og so kanska formalisera samstarvið seinni, metir Jógvan Mørkøre.

### Flokslagnan

Men hvussu við Gerhardi og flokkinum. Kann hann framvegis vera í javnaðarflokkinum? Og kann javnaðarflokkurin liva við, at teir hava ein mann gangandi leysan, sum ikki hevur hildið flokstaktina, men framvegis er limur í flokkinum, men ikki í samgonguni?



*Gerhard Lognberg og Alfred Olsen avmyndaðir í tinginum í morgun. Báðir hava roynt at venda eini samgongu bakið*
*Mynd: Dagfinn Olsen*

- Sambandsflokkurin livdi t.d. við, at Alfred Olsen gjørdi nakað tað sama og fór úr samgonguni, men var verðandi í flokkinum. Tað er altíð trupult at gera samgonguskjøl og avtalur, um flokkarnir ikki eru flokkar ella ein eind. Tað hevur jú verið, og má helst vera so, at floksleiðslurnar taka avgerðir, og so laga hini seg eftir tí, men tað gerst trupult, tá flokar ikki virka sum flokkar. Og sjálvsagt missa samgonga, samgonguleiðari, og floksformenn, nakað av myndugleikanum, tá so er. Talan má vera flokkar, eindir, uttan mun til um talan er um meir- ella minnilutasamgongur. Men tá flokslimir ganga egnar leiðir, og landsstýrismenn høgga hvør eftir øðrum, og hetta ikki hevur verið átalað stórvegis, so er kanska ikki so lætt, metir Jógvan Mørkøre.

- Sitandi samgonga hórar kanska undan nú, men tað verður trupult, tí stórmál eru fyri framman, eittnú fiskivinnupolitikkurin, sum fólk eisini tykjast ósamd um, sigur viðmerkjarin.

Jógvan Mørkøre metir tó ikki, at broytta valskipanin við Føroyum sum einum valdømi kann fáa beinleiðis skuld fyri gongdina.

- Tað var jú eitt lokalmál, ið koppaði øllum, so tað kann ein ikki beinleiðis siga. Men hinvegin er arbeiðslagið kanska broytt og fólk profilera seg sjálvan. Flokslýdnið er farið og flokkar missa nakað av trúvirði, tí hvussu nógv eru nú í veruleikanum við, tá ein flokkur sigur okkurt, ella ger eina avtalu?, spyr Jógvan Mørkøre, sum sostatt metir, at tað at Føroyar eru eitt valdømi ger, at fólk seta seg sjálvan í ljósið, og harvið hevur minkar flokslýdni.

### Gerhard kundi ikki gera annað

Men um ein nú sær støðuna, har Gerhard Lognberg stendur, hvussu sær so út, tí hann er jú lokal hetja í Sandoynni?

- Hann má jú verja sítt valdømi og hann er valdur uppá tunnilsmálið. Um hann gjørdi nakað annað, so hevði hann mist trúvirðið. Hann kundi t.d. ikki farið til val næstuferð, og lova tunnil aftur. Hann hevur jú rætt, og hinir partarnir hava verið heldur ullintir, og hava vavt løgin modell og fíggingarmynstur uppí, men Gerhard hevur krav uppá meira, ja ella nei. Slík ætlan má síggjast aftur á fíggjarlógini, sigur Jógvan Mørkøre.

Um Gerhard bíðaði til 2011 og hinir í 2012 - tá valár er - siga, at "tíverri,.....", so hava teir lagt alla politiska framtíð hjá Gerhardi í oyði, sigur Jógvan Møkøre.

### Hvat hendur nú

- Gerhard hevur sparkað bóltin aftur til javnaðarflokkin. Hann hevur eisini funnist harðliga at flokki og leiðslu, og tað verður spennandi at síggja um hetta fær avleiðingar. Flokkurin hevur nógv at missa, tí Gerhard hevur gjørt seg til talsmann fyri alt Suðurøkið, men hinvegin missir flokkurin eisini trúvirði, um tingfólk sleppa at gera sum teimum lystir. Eitt er tó víst viðvíkjandi tunnilsmálinum; flokkarnir mugu melda neyvt út, hvat teir standa, sigur Jógvan Mørkøre.

# Lagna Gerhards umrødd

**Løgmaður brúkar dagin í dag til at lodda dýpið og kanna politiska landslagið og serliga hava andstøðuflokkarnir hansara áhuga, nú samgongan er í minniluta, men eisini fer floksleiðsla og starvsnevnd Javnaðarfloksins at viðgerða framtíðina hjá Gerhardi Lognberg í flokshøpi**

POLITIKKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, fer í dag at hava prát við andstøðuflokkarnar á tingi, fyri at vita, hvussu møguleikarnir eru fyri at føra politikk, nú hann leiðir eina minniluta samgongu.

- Floksleiðsla og starvsnevnd Javnaðarfloksins fara at hava fundir í dag, har m.a. støða skal takast til lagnuna hjá Gerhardi Lognberg í flokkinum, sigur løgmaður, og samsvarar hetta eisini við orðini hjá Gerhardi um, at hann er boðsendur á fund klokkan 18 í kvøld.

- Annars fari eg at fylgja við orðaskiftinum um løgmansrøðuna, og práta við andstøðuflokkarnar, fyri at vita, um til ber at finna eina búnað tilgongd úr íkomnu støðuni. Eg skilji, at nýval ikki hóvar nøkrum av pørtunum, sigur løgmaður, sum heldur, at samgongan hevur eitt skilagott samgonguskjal, sum hann vónar at sleppa at føra poitikk eftir.

Men heldur løgmaður, at tað er verleikakent at vænta sær stuðul frá stóru andstøðuflokkunum?

- Ja, eg fari at tosa við stóru andstøðuflokkarnar eisini, og eg kenni teir eisini so væl, tí teir vóru jú við í undanfarnu samgongu, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann váttar, at støðan við minnilutasamgongu er nýggj í føroyskum politiki, og tí trupul.

- Men ofta hevur verið spurt eftir hesum, tí hetta kundi verið ein skipan, sum fekk politikkin meira fram í ljósið, heldur en flokspolitikkin og flokslýdnið. Við minnilutasamgongu krevjast samráðingar og hetta gevur eisini andstøðuni møguleika fyri ávirkan. Ta hevði verið gott fyri politisku skipanina at roynt hetta, men hetta setir stór krøv, men er samstundis spennandi fyri allar partar, met .ir løgmaður, sum ikki í dag vil vátta, at hann serliga fer at royna at fáa minsta andstøðflokkin, Sjálstýrisflokkin, í sín part.

Umframt at kanna politiska landslagið í dag, skal løgmaður vera við, tá Javnaðarflokkurin tekur støðu til lagnu Gerhards í Javnaðarflokkinum.

Ja, hetta er mín dagsskrá í dag, segði løgmaður fyrrapartin, tá vit hittu hann í løgtinginum.

# Sambandsflokkurin vil geva løgmanni tíð

**-Sambandsflokkurin er altíð til reiðar, men skal flokkurin uppí, skal talvan vaskast rein, so vit kunnu byrja av nýggjum**

POLITIKKUR
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Tað var ein av niðurstøðunum, sum formaðurin í Sambandsflokkinum, Kaj Leo Johannesen, hevði fingið burturúr, eftir at tingmanningin hjá flokkinum hevði umrøtt ta politisku støðuna á fundi í morgun.

Formaðurin í Sambandsflokkinum er ikki í iva um, at tað er neyðugt við einari nýggjari samanseting í Løgtinginum, og hann heldur, at verandi støða er eitt talandi dømi um, hvussu óheppið tað er, at ein samgonga hevur bara ein tinglim í meiriluta. Tí vil flokkurin heldur hava eina sterkari samgongu.

-Sambandsflokkurin er altíð til reiðar, men vit fara ikki við upp á kvamsvís, sigur floksformaðurin.

Kaj Leo Johannesen sigur, at tann politiska kreppan, sum er íkomin, er eitt úrslit av, at krubban er tóm, og at hestarnir eru farnir at bítast. Øll vilja gera gott, men tað eru eingir ella ov fáir pengar at gera gott við. Tí er tað skeivt at halda, at kreppan við Gerhardi Lognberg og Sandoyartunlinum er tað, sum gjørdi enda á meirilutanum, tí hetta var bara ein av ósemjunum.

### Ikki minnilutastýri

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, hevur sagt, at samgongan fer at halda fram sum eitt minnilutastýri og at leita sær stuðul frá andstøðuni í hvørjum máli sær. Men hetta heldur formaðurin í Sambandsflokkinum lítið um, hóast hann ásannar, at slíkar skipanin rigga aðrastaðni sum t. d. í Danmark.

-Í Danmark er spurningurin um høgra ella vinstra, men her í Føroyum hava vit fýra vinklar, tí her er tað eisini ein spurningur um loysing ella samband. Úrslitið av einum minnilutastýri hevði elvt til split í flokkunum, tí samgongan hevði leitað sær stuðul frá einstøkum tinglimum heldur enn heilum flokkum, sigur Kaj Leo Johannesen.

-Okkara uppskot er at skipa eina nýggja samgongu og at byrja av nýggjum, og so skal hon helst hava einar fýra, fimm ella seks tinglimir í meiriluta.

### Geva løgmanni tíð

Formaðurin í Sambandsflokkinum er ikki so avgjørdur sum felagin í Fólkaflokkinum, tá tað snýr seg um misálit á sitandi stýri og at fáa verandi stýri frá.

-Eg haldi ikki, at misálit er ein gongd leið beint nú, sigur Kaj Leo Johannesen. Fyri Sambandsflokkin hevur tað størri týdning at fáa trygg politisk viðurskifti, og tað hevur størri týdning fyri flokkin enn spurningurin um misálit.

-Vit vita ikki, hvat fer at henda í samgonguni ella í Javnaðarflokkinum, og løgmaður eigur at fáa tíð til at umhugsa støðuna, sigur Kaj Leo Johannesen.